## Koyrdi útav

Eitt ferðsluóhapp var á Vatnsoyrum fríggjadagin. Beint við innkoyringina til Vatnsoyrar yvirhálar ein bilur og fer útav vegnum. Bilførarin var ikki ávirkaður av rúsdrekka, og eingin persónsskaði stóðst av óhappinum.

## Rúsdrekkakoyring í Kollfaradali

Um ellivutíðina fríggjakvøldið fór ein bilur útav vegnum við Statoilstøðina í Kollfaradali. Kvinnan, sum koyrdi bilin, var rýmd av staðnum, men varð tikin seinni. Hon er nú skuldsett fyri rúsdrekkakoyring.

## Stjól mappu á Sjómansheiminum

Ein persónur fekk sær mappuna stolna leygardagin beint við Sjómansheimið. Hálvtannað túsund krónur vóru í mappuni. Løgreglan hevur ikki skuldsett nakran í málinum enn.

## Smyril fór avstað við bilinum

Løgreglan í Havn fekk í gjár fráboðan um, at ein bilur var stolin niðri á kaiøkinum í Havn. Tann dagin var Smyril so fullur av bilum, at allir sluppu ikki við suður. Bilaeigararnir høvdu gjørt avtalu við manningina á Smyrli um at taka bilarnar við suður seinni. Og tað gjørdu teir so, men teir tóku eisini ein bil, har avtala ikki var gjørd við eigarin. Tískil helt eigarin, at bilurin var stolin. Sosialurin frættir frá løgreglustøðini í Havn, at Smyril hevur latið »stolna« bilin aftur.

-hkm

i Sosialurin




**TOYOTA COROLLA 1,9 D TERRA SEDAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** AG 787 — **KM:** 115.000
**Árgangur:** 09.06.00 — **Seinast sýnaður:** 04.03.04
**Viðmerking:** El- rútar/spegl - Radio/CD - Sentrallás - Sera penur í lakkinum.

Kr. 108.000,-



**TOYOTA AVENSIS 2,0 LINEA SOL STW AUT** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** UV 759 — **KM:** 122.000
**Árgangur:** 27.06.02 — **Seinast sýnaður:** 27.06.02
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - klimaanlegg - Radio/CD - hiti í setrum framman - Elrútar A/F

Kr. 165.000,-



**LEXUS IS 200 SPORT 6 Gear** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TP 779 — **KM:** 25.000
**Árgangur:** 05.09.02 — **Seinast sýnaður:** 05.09.02
**Viðmerking:** Alufelgur - Klimaanlegg - El rútar - El spegl - Tónaðar rútar - Tokulyktir - El innstilling av setrum - Leður setur - Radio við bandspælara - Fløguboks 6 stk. -

Kr. 276.000,-



**KIA SEPHIA 1,5 SEDAN**

**Skrásetingarnr.:** NJ 403 — **KM:** 81.000
**Árgangur:** 19.05.98 — **Seinast sýnaður:** 18.05.04

Kr. 44.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL L/B** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** KF 365 — **KM:** 69.000
**Árgangur:** 01.03.00 — **Seinast sýnaður:** 12.02.04
**Viðmerking:** Tokulyktir - Elrútar A/F - Radio/CD - fjarstýrt sentrallás

Kr. 128.000,-



**FIAT STILO 1,6** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TJ 583 — **KM:** 20.000
**Árgangur:** 11.07.02 — **Seinast sýnaður:** 11.07.02
**Viðmerking:** Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara

Kr. 128.000,-



**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT. Gear** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HB 140 — **KM:** 65.000
**Árgangur:** 31.10.03 — **Seinast sýnaður:** 31.10.03
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - El-rútar aftan og framman - El-innst. spegl við aut innlegging - Regnsensor - Klimaanlegg - Radio/band/fløguspælara - Tokulyktir Hiti í setrum framman.

Kr. 245.000,-



**HYUNDAI ATOS 1.0**

**Skrásetingarnr.:** UV 274 — **KM:** 48.500
**Árgangur:** 25.10.00 — **Seinast sýnaður:**
**Viðmerking:** Sentrallás - Elrútar

Kr. 55.000,-



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN AUT**

**Skrásetingarnr.:** SA 682 — **KM:** 59.000
**Árgangur:** 28.06.99 — **Seinast sýnaður:** 04.08.04
**Viðmerking:** El-rútar/spegl - sentrallás

Kr. 82.000,-



**PEUGEOT 307 2.0 HDI** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** RL 931 — **KM:** 22.000
**Árgangur:** 17.06.03 — **Seinast sýnaður:** 17.06.03

Kr. 157.000,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


FØROYA BANKI

# *Móttøka*

Eftir 12 ár í Føroyum ynskir **Jørn Astrup Hansen** at venda aftur til Danmarkar. Við endan av apríl 2005 fer Astrup sostatt úr starvi sum forstjóri í Føroya Banka.

Tað hevði glett okkum at hitt viðskiftafólk, yrkisfelagar og vinir til móttøku í hølum bankans í Húsagøtu 3

*fríggjadagin 29. apríl 2005, kl. 15 – 17,*

har høvi verður at siga Astrup farvæl.

Tað verður við sama høvi møguleiki at heilsa upp á **Janus Petersen**, sum 1. mai 2005 tekur við eftir Jørn Astrup Hansen sum ovasti leiðari bankans.

FØROYA BANKI

Nevndin